

*Mynd: Ditte Mathilda Joensen*

# ÁRSFRÁGREIÐING 2023

## REYÐI KROSSUR FØROYA

# INNIHALDSYVIRLIT


**Innihaldsyvirlit** ..... 2
**Um Reyða Kross** ..... 3
**Fororð frá formanninum** ..... 4
**Støðulýsing** ..... 5
**Nevnd** ..... 6
**Skrivstova** ..... 6
**Endurnýtsla** ..... 7
Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka ..... 8
Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu ..... 8
Endurnýtsluhandilin í Vági ..... 9
Klædnainnsavningin ..... 9
Klædnaskiljingin ..... 10
Bókasølan ..... 10
**Tilbúgving** ..... 11
Fyrstahjálpin ..... 11
Ársins Fyrstihjálpari ..... 12
Samarittar ..... 13
Flóttahjálpin ..... 13
Flóttamóttøkuhúsið ..... 14
**Sosialt arbeiði** ..... 16
Vitjanartænastan ..... 16
Mat- og Klædnahjálpin ..... 17
Integratión ..... 18
Familjulega fyri fólk við tilflytarabakgrund ..... 18
Málkafé ..... 18
Reyða Kross Vinir ..... 19
Jólahjálp ..... 20
Jólabókagávur ..... 20
**Innsavningar** ..... 20
Filateli ..... 20
Peningakistlar ..... 20
Landsinnsavning ..... 20
Opið hús ..... 21
**Altjóða arbeiði** ..... 22
Karmar ..... 22
Altjóða starvsfólk hjá RKF ..... 22
Hjálp til Malavi eftir tropisku ódnina Freddy ..... 23
Hjálp eftir jarðskjálvta í Turkalandi og Sýria ..... 23
Hjálp eftir yvirflóð í Libya ..... 23
Hjálp eftir jarðskjálvta í Marokko ..... 23
Hjálp eftir jarðskjálvta í Afghanistan ..... 23
Hjálp til neyðstødd í Ísrael og Gaza ..... 24
Hjálp til tey harðast raktu í Somalia ..... 24
Hjálp til neyðstødd børn í Myanmar ..... 24
Hjálp til neyðstødd í Jemen ..... 25
Samstarv við United World College Red Cross Nordic ..... 25

# UM REYÐA KROSS



Reyði Krossur er heimsins størsti humaniteri felagsskapur við umleið 14 mió. sjálvbodnum í 192 londum kring heimin. Endamálið hjá Reyða Krossi er at verja lív og heilsu, tryggja virðingina fyri menniskjanum, umframt at verja sínámillum semjur, vinalag, samstarv og varandi frið millum øll fólkasløg.

Í einum heimi við alt meira avbyrging, spenningum og valdsmisnýtslu er tað av stórum týdningi, at Reyði Krossur virkar fyri teimum virðum og aðalreglum, ið tryggja virðing fyri menniskjanum. Harvið mennist grundarlagið fyri samstarvi millum lond og fólk um at finna loysnir til felags avbjóðingar. Reyði Krossur virkar tí áhaldandi í samljóði við sjey aðalreglur, ið tryggja, at alt virksemið hjá felagsskapinum er:




Hugsjónin handan Reyða Kross er frá 1859, eftir at Henry Dunant sá stóra tørvin á humaniterari hjálp í orrustuni við Solferino. Í 1863 varð Altjóða Reyða Kross nevndin, ICRC (*International Committee of the Red Cross*), stovnað, og innan eitt ár høvdu 12 lond skrivað undir hin fyrsta Genevesáttmálan. Hetta var søguliga sæð slóðbrótandi til frama fyri altjóða hjálpararbeiði. Altjóða nevndin arbeiðir í kreppu-, stríðs- og krígsstøðum. Genevesáttmálarnir frá 1949 og fylgiskjøl teirra geva nevndini í Altjóða Reyða Krossi heimild til av sínum eintingum at arbeiða í krígsraktum økjum og londum.

Reyði Krossur Føroya (RKF) varð stovnaður 2. apríl 1926 og er eitt sjálvstøðugt felag. Í altjóða samanhangi eru Genevesáttmálarnir frá 1949 heimildargrundarlagið fyri virkseminum hjá Reyða Kross feløgunum, og RKF er í tí høpi partur av *Røde Kors i Danmark* (RKiD). Áleið 400 sjálvboðin eru virkin í Reyða Krossi í Føroyum.

Altjóða føderatiónin av Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgum, IFRC (International Federation of Red Cross and Red Crescent Societies), var stovnað í 1919. Altjóða føderatiónin er meginfelagið fyri tey 192 landsfeløgini og arbeiðir saman við lands-feløgunum í sambandi við náttúruvanlukkur og menningarhjálp.

Føderatiónin, IFRC, feløgini kring heimin og altjóða nevndin, ICRC, verða í felag nevnd Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Rørslan. Øll hesi eru tvinnað saman við teimum sjey aðalreglunum.

# FORORÐ FRÁ FORMANNINUM

Tað er nakrir stórir ella serligir dagur í árinum hjá okkum sjálvbodnu í Reyða Krossi. Dagar, sum ikki eru sum hinir, tí teir líkjast burturúr. Tað er, tá vit fara árligu útferðina, tað er, tá vit hava jólahugna uppi á Hotel Føroyum, Tað er, tá vit hava Opið Hús, og tað er dagurin í dag, tá vit halda aðalfund.

Vælkomin øll somul á árliga aðalfundin, sum aftur í ár verður stýrdur av “The grand old Man”.

Aðalfundurin er høvið, tá vit líta aftur í tíð og fram í tíð. Og hondina á hjartað, onkuntíð hevur tað verið lættari bæði at kaga aftur sum fram í tíð, enn tað er í dag. Fyri gott og væl tveimum árum síðani var einki kríggj í Evropa og einki kríggj niðri í Miðeystri. Við undantak frá syrgiliga stríðnum á Balkan í 90´árunum, so hevði friður valdað í Evropa síðan seinna veraldarbardaga.

Men hjálparfelagsskapir vóru ikki arbeiðsleysir av tí orsøk, tí teir høvdu úr at gera við at veita hjálp, tí aðrastaðni longur burtur vóru lond rakt av borgarakríggi og náttúruvanlukkum, sum gjørdu, at milliónir av fólkum liðu hungur og hall, og aðrar milliónir gjørdist flóttafólk.

Tað kundi verið eitt ynski at havt, at tann dagur upprann, tá Reyði Krossur bara fekst við at hjálpa, har náttúran ikki var við okkum, og tað hevði í sjálvum sær eisini verið nóg mikið. Men nei, menniskjan heldur áfram við at vera sín egni versti fíggindi, tíverri.

Men hóast vit seinastu tíðina hava verið ótrúliga virkin úti í heimi, har vit hava megnað at veitt peningaligan stuðul fyri oman fyri 20 mió. kr. bara tey seinastu trý árini, so hava vit eisini megnað at verið sera virkin her heima. Eg haldi, eg tori at siga, at Reyði Krossur ongantíð áður hevur havt so nógv virksemi í Føroyum sum nú, sum eisini framgongur av væl útgreinaðu frágreiðingini, sum er løgd til tykkum her á aðalfundinum.

Vanligu virkisøkini, sum vit øll kenna, ganga eisini hugtakandi væl. Vit arbeiða alsamt við at betra um tey og eisini at útbyggja tey. Serliga hava vit seinastu tíðina sæð ein markantan vøkstur innan Mat- og Klædnahjálpina, har serliga matsíðan veksur. Hetta er sjálvandi eisini ein avleiðing av, at alt í samfelagnum er vorðið munandi dýrari. Ikki bara rentur og oljuprísir, men tíverri eisini vanligar gerandisvørur, sum familjurnar brúka hvønn einasta dag. Men vit fylgja gongdini neyvt, so tað ikki er hjá okkum, at eingin hjálp er at heinta.

So arbeiðsleys verða vit ongantíð, tíverri.

Lat meg stutt nevna, at vit í árinum, sum fór, hava mist nøkur av okkara sjálvbodnu. Tey minnast vit í virðing og takksemi. Nevndin misti eisini ein nevndarlim í árinum, tá Hans Jákup Simonsen brádliga doyði. Eisini hann minnast vit í takksemi og virðing.

Eg vil her stutt takka tykkum øllum sjálvbodnu, nevndarlimum og skrivstovu fyri eitt ótrúliga gott samstarv í farna árinum, og eg ivist onga løtu í, at hetta árið verða vit øll uppaftur betri til okkara starv sum sjálvboðin. Eg vil nýta høvið at takka tykkum mongu sjálvbodnu fyri tykkara ótrúliga flotta arbeiði. Uttan tykkum var eingin Reyði Krossur, tað er bara ein veruleiki, hvørki meira ella minni. Eg vil eisini takka teimum mongu, sum stuðla okkum bæði fíggjarliga og á annan hátt og almennu myndugleikunum fyri framúr gott samstarv.

Jóannes Eidesgaard
Formaður

# STØÐULÝSING

Í Reyða Krossi var 2023 eitt ár, ið var merkt av stórum fokusi á heimsins brennideplar, har ófriður og stríð fylla yvirskriftirnar. Og í dagsins samfelagi hava hendingar, so sum kríggj og veðurlagsbroytingar kring heimin, eisini fylgjur í Føroyum, og var árið her heima sostatt eisini merkt av óvissari tíðum. Vit merkja, at tað er vorðið dýrari at liva. Vit gerast alsamt fleiri eldri, og fleiri, sum liva í einsemi. Vit gerast fleiri tilflytarar og flóttafólk, og manglandi integratiónslóg kann vera við til, at summi hava trupult við at fóta sær. Ímeðan vit gerast alsamt fleiri og savnast til størri tiltøk, setast eisini størri krøv til tryggleika. Og tá samfelagskreppur og avbjóðingar stinga seg upp, vita vit, at tað eru alsamt fleiri viðkvæmir bólkar, sum neyðugt er at taka hædd fyri.

2023 var altso eitt ár, har stórur tørvur var á hjálpararbeiði, og var stórur eftirspurningur eftir hjálpartænastunum hjá Reyða Krossi í Føroyum. Eisini var Reyði Krossur rættiliga sjónligur í 2023 - bæði í miðlunum og í samfelagnum sum heild, og merktist stór vælvild frá privatfólki, fyritøkum og landi, sum eitt nú hevði við sær hægri inntøkur.

Og alt hetta – økti tørvurin á hjálp, álitið frá fólki og landi – tað pliktar. Tað pliktar okkum at gera tað besta vit eru ment, fyri at liva upp til álitið, sum er víst okkum, og tey málini, vit hava sett okkum.

Ítøkiliga var arbeiðið hjá Reyða Krossi í 2023, eins og undanfarna ár, nógv merkt av at Føroyar hava latið dyrnar upp fyri flóttafólkum. Umframt at Reyði Krossur stendur fyri at reka *Flóttamóttøkuhúsið*, so hevur tað sjálvbodna virksemið eisini verið nógv merkt av hesum, serliga *Reyða Kross Vinir* og nýggjasta virksemið, *Flóttahjálpin*. Við hesum trimum virksemisøkjum er Reyði Krossur sostatt við í gongdini, frá tí at flóttafólkini stíga í land og móttøkutoymið tekur ímóti teimum, til at hjálpa og vegleiða í tíðini í móttøkuhúsinum, og síðan at stuðla teimum, tá tey fara víðari út í samfelagið við Reyða Kross Vinum.

Arbeiðið við flóttafólkum hevur veruliga verið við til at seta sjóneykuna á hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í Føroyum. Og verður størri orka eisini løgd í arbeiðið í Føroyum nú, enn fyri fáum árum síðan.

Men tað er ikki bara arbeiðið við flóttafólkum, sum hevur verið merkt av stórum eftirspurningi í 2023. Eitt nú var eftirspurnin-gurin á mat- og klædnahjálp, enn einaferð, metstórur. Vitjanartænastan varð útbygd við enn einum øki. Samarittarnir høvdu fullan kalendara í summarmánaðunum og fleiri nýggir samarittanæmingar vóru útbúnir. Endurnýtslu-handlarnir gerast alsamt betri umtóktir, og mongdin av klæðum, sum verður savnað inn, økist fyri hvørt ár, samstundis sum tað, *tíbetur*, javnan legst til við fleiri eldhugaðum sjálvbodnum.

Tí sjálvboðin eru nemliga grundarlagið undir øllum. Vit kunnu nú errin siga, at tað teljast meir enn 400 føst sjálvboðin í Reyða Krossi Føroya. Sjálvboðin greiða ofta frá, at tað er bæði hugnaligt og gevandi at vera sjálvboðin, samstundis sum tað er nógv at gera. Tí verður eisini arbeitt fyri at tryggja trivna og áhuga hjá sjálvbodnum, eitt nú við árligari útferð, sum í 2023 var í Suðuroynni, árligum jólaborðhaldi, har heili 230 sjálvboðin tóku lut í 2023, umframt við fleiri meir og minni føstum átøkum, so sum hugnaløtum og Opið Hús.

Reyði Krossur Føroya var eisini virkin á altjóða pallinum í 2023. Smáar fimm milliónur krónur vórðu í 2023 latnar til humanitera hjálp kring heimin, eitt nú eftir ógvusligar náttúru-vanlukkur í Turkalandi, Sýria, Afghanistan og Marokko.

Samanumtikið var 2023 eitt ár, har Reyði Krossur Føroya mentist nógv, alt ímeðan ovmikið var at gera. Vit í Reyða Krossi fegnast um at merkja vælvild og undirtøku fyri okkara arbeiði, og takka hjartaliga øllum samstarvspørtum, stuðlum og, ikki minst, sjálvbodnum fyri trúgvan stuðul í 2023.

# NEVND

Nevndin er evsti myndugleikin hjá RKF. Hon er mannað við fimm nevndarlimum og tveimum varalimum, sum øll eru sjálvboðin og ólønt. Nevndin verður vald á aðalfundinum. Nevndarlimirnir verða valdir fyri tvey ár, og varalimirnir fyri eitt ár. Annaðhvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa hinir tríggir fyri vali. Á mánaðarligum fundum viðger nevndin mál av týdningi saman við skrivstovuni. Varalimirnir eru við til vanligar nevndarfundir.

Í nevndini hjá Reyða Krossi í 2023 vóru:

- Jóannes Eidesgaard (formaður)
- Torfinn Højgaard (næstformaður)
- Mary-Ann Thomsen (kassameistari)
- Fía Niclasen (nevndarlimur)
- Súsanna Thomsen (nevndarlimur)
- Eyrith Guttesen Leyni (varalimur)
- Hans Jákup Simonsen (varalimur)

Hin 24. juni 2023 bórust boð um, at Hans Jákup Simonsen, var farin um sýn. Hans Jákup verður borin í minni fyri hansara stóra arbeiði sum nevndarlimur í Reyða Krossi, har hann hevði ábyrgd av fyrstuhjálpini og samarittatænastuni. Friður verið yvir minnið um Hans Jákup Simonsen.

# SKRIVSTOVA

Skrivstovan hevur ábyrgd av at skipa, reka og menna dagliga virksemið hjá RKF. Tað verður gjørt í samstarvi við nevndina, sjálvbodnar virksemisleiðarar og onnur sjálvboðin. Skrivstovan er lønt og hevur dagligu ábyrgdina av virkseminum hjá RKF.

Trý starvsfólk arbeiddu fast á skrivstovuni hjá Reyða Krossi í 2023. Sigrið Zachariasen, sum dagligur leiðari, Katrin Dalsgaard Nolsøe sum samskipari, og Bjørk Berg Wiggins sum sosial- og integratiónssamskipari. Harumframt hevur Katrin Mørkøre, samskipari í Flóttamóttøku-húsinum, eisini havt sína dagligu gongd á skrivstovuni, og Tórgerð Jallgrímsdóttir hevur havt hálvtíðarstarv sum samskipari í fyrstuhjálpini. Tórgerð gavst í starvinum í november 2023, hon heldur tó á fram sum instruktørur í fyrstuhjálp, og Jákup av Skarði tekur í 2024 yvir sum samskipari.

Í 2023 arbeiddi skrivstovan millum annað við:

**Hjálpararbeiði** innan sosiala økið og tilbúgving, átøk til frama fyri viðkvæmar bólkar í Føroyum og innan altjóða humanitera hjálp.

**Rakstri og menning** av virksemisøkjunum hjá RKF, t.d. samskifti inneftir og úteftir, menning av tilfari og vegleiðingum, fyriskipan av førleikamennandi skeiðum til sjálvboðin og starvsfólk, fíggjarviðurskifti, kunning og upplýsing (eitt nú á heimasíðuni, á sosialum miðlum, við tíðindaskrivum), lýsingar og at loysa uppgávur saman við sjálvbodnum.

**Samskipan** av tiltøkum og verkætlanum, t.d. Landsinnsavning, opið hús, familjulegu, ársins fyrstuhjálpara, trivnaðartiltøk fyri sjálvbodnum (eitt nú útferð og jólahugna), fundir, skeið og annað.

**Samstarvi** við eitt nú fyritøkur, kommunur, myndugleikar, stovnar, *Røde Kors i Danmark*, *Rauði Krossinn á Íslandi*, felagsskapir og við Føroya Landsstýri.

# ENDURNÝTSLA

Endamálið við endurnýtsluvirkseminum er at savna pening til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi, bæði í Føroyum og kring heimin.

Endurnýtsluvirksemið í Reyða Krossi veksur støðugt. Í 2023 vóru góð 200 sjálvboðin á hesum virksemisøki, sum fevnir um klædnainnsavning, klædnaskiljing, klædnasølu og bókasølu.

Gongdin í endurnýtsluni er tann, at klædnainnsavningin savnar klæðir inn úr bingjunum kring landið, meðan Klædnaskiljingin skilir klæðini. Skildu klæðini fara síðan til:

- klædnahjálpina, sum hjálpir familjum, ið ikki eru so væl fyri fíggjarliga,
- teir tríggjar endurnýtsluhandlarnar, sum selja klæðir – ein á Bryggjubakka í Tórshavn, ein í Stiðjagøtu í Tórshavn og ein í Vági, sum selur klæðir og lutir,
- umframt, at tað, sum ikki verður selt í Føroyum, verður sent til Týsklands til endurnýtslu.

Eisini verður í Reyða Krossi tikið ímóti bókum til bókasøluna í Vágsbotni umframt at tikið verður ímóti frímerkjum.

Samlaða inntøkan frá allari endurnýtsluni í 2023 var 2,7 milliónir krónur. Hetta gav eitt yvirskot á góðar 2 milliónir.

Á síðunum niðanfyri ber til at lesa, hvussu hevur gingist í virksemisøkjunum í endurnýtsluni, hvør sær, í 2023.



*Gott og væl **200** sjálvboðin eru virkin í endurnýtsluni*




*Yvirskotið úr endurnýtsluni í 2023 var **2 mió kr.***



*Endamálið við endurnýtsluni er at savna pening til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi, bæði í Føroyum og kring heimin. Myndin omanfyri er úr Marokko, sum í september varð rakt av ógvusligum jarðskjálvta, har fleiri túsund familjur mistu teirra heim. Reyði Krossur Føroya læt 250.000 kr. til hjálparátøk hjá Reyða Hálvmána í Marokko, sum eitt nú útlutaðu tjøld, madrassur og dýnur.*




*Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka*

## Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka

Reyði Krossur hevur havt endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka síðani 2006. Áleið 35 sjálvboðin eru knýtt at handlinum. Sølan í Endurnýtsluhandlinum á Bryggjubakka í 2023 var **303.751 kr**. Hetta er meir enn í 2022, tá inntøkan var 221.944. og væl meir enn í 2021, tá inntøkan var 137.944 kr.

Handilin er fast opin hvønn mikudag, hósdag og fríggjadag kl. 13:30 – 17:30. Harumframt brúka sjálvboðin ein dag um vikuna í handlinum at gera klárt, heingja klæðir upp, prísa, og taka myndir. Hvønn týsdag verða myndir av vøruni lagdar út á facebooksíðuna hjá handlinum, har til ber at fylgja við í tíðindum úr handlinum.

Í summarmánaðunum í 2023 varð ein verkætlan sett í verk, at har niðara hæddin varð latin upp, og gangast kundi inn frá bæði Bryggjubakka og Vágsbotni. Verkætlanin hevði við sær, at nakrar broytingar fóru fram í handlinum, eitt nú komu fleiri sjálvboðin og sølan fór nakað upp – handilin á niðaru hædd hevði eina inntøku á 60.000 kr. í juli - september. Samstundis gavst Una Hansen sum virksemisleiðari í handlinum, og Reyði Krossur takkar Unu so hjartaliga fyri góða og trúgva tænastu og gott samstarv í nógv ár.

Umframt summarverkætlanina var eitt sera væleydnað tiltak á Mentanarnáttini, har stativ stóðu úti og pynt hingu í trøðunum við kirkjuna, umframt køkusøla. Eisini var handilin opin allan dagin, tá Landsinnsavningin var, og riggaði hetta eisini væl.

## Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu

Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu lat á fyrsta sinni upp leygardagin 2. apríl 2016. Útvið 50 sjálvboðin eru knýtt at handlinum. Sølan var aftur metstór í 2023 – inn komu heilar **1.672.194 kr**. Undanfarna ár var eisini metár, tá var inntøkan 1.428.727 kr. Og í 2021 var hon 1.239.334 kr. Handilin var opin í tilsamans 48 dagar í 2023, sum merkir, at miðalsølan er 34.800 kr. hvønn søludag.

Barnaklæðir vóru 25% av inntøkuni í 2023 – tað vil siga góðar 417.000 kr.

Nakað av broytingum í innrætting hava verið í 2023, millum annað var diskurin fluttur, samstundis sum nýggjur diskur og nýtt kassatól varð keypt, soleiðis at tað nú er møguligt at gjalda við tveir kassar, í staðin fyri ein, sum var frammanundan. Eisini hava sjálvboðin sett nakrar nýggjar hillar og annað upp, og hevur handilin harvið fingið betri gólvpláss.

Í november 2023 var Opið Hús í Reyða Krossi, hetta tiltakið eydnaðist væl, bæði við vitjandi, sølu og ímillum sjálvboðin, ið vóru til arbeiðis.

Handilin er opin hvønn leygardag kl. 10-15, og selur góð klæðir til børn og vaksin. Handilin er sera væl vitjaður - sum góða úrslitið eisini ber boð um - og tað er ikki óvanligt at síggja langa bíðirøð uttanfyri handilin leygarmorgnar, áðrenn dyrnar lata upp.

Hvønn leygardag eru áleið sjey sjálvboðin til arbeiðis, harav tvey eru fast í barnadeildini. Tey flestu hava ein fastan leygardag um mánaðin, har tey eru til arbeiðis. Umframt leygardagsarbeiðið verður hvørja viku arbeitt við at fáa vøru út í handilin, pynta, prísa og taka myndir til facebooksíðuna hjá handlinum. Her vera nógvir sjálvbodnir tímar lagdir í – tí jú meir handilin selur, jú meir arbeiði krevst at gera handilin kláran til næsta søludag.

## Endurnýtsluhandilin í Vági

Endurnýtsluhandilin í Vági læt á fyrsta sinni upp í 2011. Síðan 2020 hevur handilin hildið til í Handlinum í Gørðunum í Vági. Í 2023 seldi Endurnýtsluhandilin í Vági fyri **204.891 kr**. Hetta er ein øking í mun til 2022, tá inntøkan var 164.343 kr. Í 2021 var sølan 127.456 kr.

Handilin er skipaður við einum leiðara, og eru tey sjey sjálvboðin tilsamans. Endurnýtsluhandilin í Vági er opin fýra dagar um vikuna: mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 14.00 til 17.30 og leygardag kl. 10.00 til 13.00.

Í 2022 lat nýggj deild upp í Endurnýtsluhandlinum í Vági, sum selur innbúgv, ting og búnýti, og heldur til í kjallaranum á Gørðunum, sum millum Vágbingar vanliga verður nevndur "Kjøtkjallarin". Nú nýggja deildin hevur verið opin eitt ár, kann sigast, at tað hevur gingið væl og fólk hava tikið væl ímóti nýggja handlinum. Tvey sjálvboðin eru knýtt at handlinum í Kjøtkjallaranum.

Av tiltøkum í 2023 kann nevnast, at í mai vóru útvið 100 sjálvboðin frá Reyða Krossi á útferð í Suðuroy, og her var sjálvandi eisini ein steðgur í Endurnýtsluhandlinum í Vági. Harumframt plagar Endurnýtsluhandilin á hvørjum ári at skipa fyri kafé á jólum, og selja bollar og kakao – hetta varð gjørt aftur í ár, og kom fitt av fólki á gólv.

## Klædnainnsavningin

Sjálvboðin í klædnainnsavningini koyra hvørja viku kring landið í hvíta vøruvogninum hjá Reyða Krossi og tøma bingjur við endurnýtsluklæðum. Klæðini verða síðan koyrd til skiljimiðdepilin í Stiðjagøtu 6, har klædnaskiljingin stendur fyri at skilja klæðini.

28 endurnýtslubingjur eru kring landið: í Klaksvík, Fuglafirði, Saltangará, Miðvági, Vági, Tvøroyri, Vestmanna, Sandi og Tórshavn.

Í 2023 hevði klædnainnsavningin **342.485 kr**. í inntøku. Inntøkan stendst av sølu av endurnýtsluklæðum í Týsklandi – hetta eru tey klæðini, ið ikki verða seld í handlunum. Í 2023 vóru 15 bingjur, við áleið 10 tonsum av klæðum í hvørjari, sendar til Týsklands, samanborið við 14 í 2022 og 12 í 2021. Hóast tað kostar at senda bingjur av landinum, so fáa vit góðan stuðul frá Faroe Ship, og er úrslitið fyri klædnainnsavningina 77.000 kr.

Klædnainnsavningin telur 26 sjálvboðin. Klædnainnsavningin er ikki skipað við einum virksemisleiðara, tó hava ávísu vikubólkarnir ábyrgd av hvørjari viku sær. Trivnaðurin er sum heild góður, holdini eru sera sjálvkoyrandi og sjálvboðin leggjast afturat við jøvnum millumbili.

Í 2023 vórðu bingjursettar upp á Sandi, og nú tunnilin er komin, er tað bara upp aftur lættari at tøma tær aðru hvørja viku.



*Á tekstilendurnýtsluni í Týsklandi. Frá vinstru: Oliver, starvsfólk á verksmiðjuni, Mary-Ann, sjálvboðin nevndarlimur, Inga, sjálvboðin virksemisleiðari í skiljingini, og Katrin, samskipari á skrivstovuni.*

## Klædnaskiljingin

Sjálvboðin í klædnaskiljingini hava ábyrgd av at skilja innkomnu klæðini, sum klædna-innsavnarar heinta úr endurnýtslubingjunum kring landið.

Áleið 80 sjálvboðin eru regluliga virkin í klædnaskiljingini, sum er skipað við einum virksemisleiðara og einum leiðara fyri hvønn skiljibólk. Tilsamans eru 14 skiljibólkar, sum hava hvør sína føstu tíð um mánaðin. Nakrir bólkar arbeiða einaferð um mánaðin, aðrir eru til arbeiðis aðrahvørja viku. Bólkarnir eru ymiskir til støddar – millum fýra og tíggju í hvørjum, og teir arbeiða áleið fýra tímar hvørja ferð. Umframt hesar føstu tíðir, eru onnur, sum eitt nú fínskilja, rundanum tær føstu tíðirnar.

Sum heild hevur tað gingið gott í 2023, og gott er eisini, at umbyggingin er liðug, tó at plássið er heldur trongligt, við nógvu klæðunum sum koma inn. Trivnaðurin ímillum skiljararnar er sum heild góður, og nógv kenna hvønn annan áðrenn tey byrja.

Innkomnu klæðini verða skild soleiðis, at tey bestu barnaklæðini fara til Klædnahjálpina, ein partur fer í endurnýtsluhandlarnar, og tað, sum ikki verður selt í Føroyum, verður sent til endurnýtslu í Týsklandi.

Í 2023 varð lyfta tikin í nýtslu í skiljihølinum. Lyftan betrar um atkomuviðurskiftini til ovaru hæddina, og lættir um, tá klæðir skulu berast uppá.

Av serligum tiltøkum í 2023 kann nevnast, at Opið hús riggaði bara heilt væl, hópin av fólki vóru inni og hugdi eftir hvussu alt fyrigongur. Eisini var virksemisleiðarin í skiljingini í Týsklandi, saman við kassameistaranum, sum hevur ábyrgd í nevnd av skiljingini, og samskiparanum á skrivstovuni, har vitjað varð á tekstilstøðini, har klæðir, ið ikki verða nýtt í Føroyum, verða seld til. Har fingu tær kunning um, hvat hendur við klæðunum, sum vit senda av landinum. Við heimkomu varð vitjanin úr Týsklandi brúkt til bæði alment og innanhýsis at kunna áhugað um, hvussu klæðini verða endurnýtt víðari eftir at tey eru farin frá okkum.

## Bókasølan

Inntøkan í Bókasøluni var **180.041 kr.**, sum er nakað meir enn í fjør, tá inntøkan var 171.269 kr. Í 2021 var inntøkan 160.480 kr.

Vælvitjaða Bókasølan í Vágsbotni er eitt slag av sjálvtøku, har fólk sjálvi keypa og gjalda fyri bøkurnar. Bókasølan er opin sjey dagar um vikuna. Bókasølan er skipað við einum virksemisleiðara, og átta sjálvbodnum. Tríggir mans halda dagliga eyguni við Bókasøluni - teir eru framvið og hyggja, um nakað nýtt er komið, og tá neyðugt er, leggja teir nýggjar bøkur fram. Harumframt er føst skipan við at lata upp og læsa morgnar og kvøld.

Hvørt mikukvøld millum kl. 19.00 og 21.00 hittast sjálvboðin í Bókasøluni til ein kaffimunn og prát. Tá hava fólk eisini høvi at koma við bókum og øðrum.

Bókasølan fær allar bøkurnar ókeypis, og útreiðslurnar eru nærum ongar, og tí munar Bókasølan ógvuliga væl.



*Bókasølan í Vágsbotni er ómannað tað mesta av tíðini, og er opin sjey dagar um vikuna.*




# TILBÚGVING

**Í tilbúgving er RKF serliga virkin við samarittatænastu og fyrstuhjálparundirvísing, umframt við hjálparátøkum, tá kreppur raka. Eitt nú við *Hjálparnetverkinum*, tá korona rakti í 2020. Og í 2022, tá vápnað stríð tók seg upp í Ukraina, var *Flóttahjálpin* skjótt uppskalerað. Eitt, sum eyðkennir hesar báðar síðst nevndu hjálpartænastur, og er sermerkt fyri tilbúgvingina hjá Reyða Krossi, eru tey spontant sjálvboðnu, sum melda seg til at hjálpa, tá umstøðurnar í samfelagnum krevja tað. Hesi eru fyri tað mesta nýggj sjálvboðin, ið ikki eru virkin í vanliga virkseminum hjá RKF frammanundan, men eru til reiðar at hjálpa, tá á stendur.**

***1663** prógv í fyrstuhjálp*

***22** samaritta-vaktir*

***65** flóttafólk heintað av móttøku-toyminum*

## Fyrstahjálpin

Nógv virksemi var í fyrstuhjálpini í 2023, nógv skeið hava verið hildin og 1.663 prógv vórðu útskrivaði.

Samlaða úrslitið fyri fyrstuhjálpina í 2023 var 239.976 kr.

Fýra útbúnir instruktørar eru virknir innan kropsliga fyrstuhjálp, umframt tveir í sálarligari fyrstuhjálp.

Sum nakað nýtt var Reyði Krossur í 2023 partur av samstarvi við Betri og Undirvísingarstýrið, har Betri læt eitt fyrstuhjálparskeið í jólagávu til allar næmingar í 7. flokki kring landið. Talan var um eitt sergjørd skeið á 3 tímar, sum vóru hildin í fyrru helvt av 2023, og fingu næstan 700 næmingar prógv.

Í oktober var RKF fyri aðru ferð við til at skipa fyri tiltakinum Hjartastart á torginum í SMS. Endamálið við tiltakinum var at varpa ljós á týdningin av fyrstuhjálp og at duga at nýta hjartastartara. Eisini umboð fyri samarittarnar vóru við.

Nøkur skeið í sálarligu fyrstuhjálp hava verið fyri sjálvbodnum í Reyða Krossi í 2023. Hesi hava verið sera væl dámd, og verða væntandi enn fleiri hildin í 2024.



*Jólagávan frá Betri: fyrstuhjálparskeið til allar næmingar í 7. flokki kring Føroyar*

## Ársins Fyrstihjálpari

RKF tilnevndi fyri fyrstu ferð Ársins Fyrstahjálpara í 2001, og síðani hevur hetta verið ein fastur árligur táttur, ið er við til at varpa ljós á týdningin av at duga fyrstuhjálp.

Heiðurin sum Ársins Fyrstihjálpari 2023 fór til Dagstovnin á Flatinum, fyri hending, tá tveir fýra ára gamlir dreingir spældu við eina kavaklædda á í barnagarðinum, og ein teirra brádliga datt í eitt hol og fór inn undir kavan. Hin drongurin boðaði starvsfólkum frá, sum síðan fóru undir at grava og at veita lívbjargandi fyrstuhjálp. Tilnevningin "Ársins fyrstihjálpari" varð latin stovninum, við tí grundgeving, at starvsfólkini í góðum samstarvi bjargaðu barninum og skipaðu umstøðurnar. Stutt áðrenn hendingina tóku starvsfólkini fyrstuhjálparskeið, og er hetta víst grund undir, at til bar at hjálpa á fleiri støðum í senn, bæði at minka um vandan, bjarga og verja onnur móti óneyðugum órógvið.

Eisini fingu teir átta fjallmenninir, Jákup, Oluf, Jákup, Oddur, Hallur, Ólavur, Pætur og Dávur, heiður fyri gott avrik innan fyrstuhjálp, tá maður smokkaði saman við borðið, eftir at hava verið á fjalli. Menninir skiltu støðuna og bóru skjótt og væl at. Tó at hjartastartarin ikki riggaði, mistu bjargingarfólkini ikki mótið, men góvu rætta viðgerð.

Og somuleiðis fekk Gert heiður fyri at veita fyrstuhjálp, tá sýra spruttaði í eygað á konuni – Gert var skjótur og skolaði beinanvegin eygað, og tá ið støðan er undir kontrol varð ringt eftir hjálp.

Eins og undanfarin ár, var Ársins Barnaheiður latin fyri gott avrik innan fyrstuhjálp.

Hjarnar Friðrik fekk heiður fyri bragdið, ið hann framdi á Oyrarbakka, tá vinmaðurin datt í ánna, og Hjarnar Friðrik skundaði sær at boða starvsfólkum í Dagstovninum á Flatinum frá. Bert fýra ára gamal skilti Hjarnar Friðrik álvarsligu støðuna og megnaði at boða vaksnum frá, soleiðis at vinmaðurin varð bjargaður.

Somuleiðis vóru Philip og Ísakur eisini tilnevndir Ársins Barnheiður fyri avrik teirra, tá tríggir dreingir spældu og ein var so óheppin at detta og fella í óvit. Philip og Ísakur mettu støðuna væl, við at annar var eftir hjá tí skadda, meðan hin rann eftir hjálp. Og Katrin Maria og Sandra fyri avrikið, tá 7 ára gamal drongur var áhaldsin og slóð høvdið í ein stein, og tær kvikar runnu eftir hjálp. Og at enda fekk Levi eisini Ársins Barnaheiður 2023, tá hann sá mann liggjandi í túninum og boðaði frá.

Øll fingu heiðursbræv og gávu frá Betri.



*Ársins fyrstuhjálparar 2023, Dagstovnurin á Flatinum, og Ársins Barnaheiður, Hjarnar Friðrik.*

## Samarittar

Samarittarnir høvdu 305.576 kr. í inntøku í 2023, sum er hægri enn í 2022, tá inntøkan var 196.606 kr.

Samarittarnir høvdu 22 vaktir í 2023, í 1160 tímar tilsamans. 24 sjálvboðin vóru virkin í samarittunum í 2023. Av teimum vóru nøkur búsitandi uttanlands og vóru sostatt mest virkin í feriunum, sum er ein stór hjálp. 11 fingu útbúgving í 2023, ávikavist sum næmingar, og 9 víðari til assistentar.

Árið byrjaði við eini vitjan á alarmsentralinum og hjá ambulansutænastuni, har hoyrt var um teirra arbeiði. Í mars var ein venjingarlega í Klaksvík saman við Norðoyar Bjargingarfelagi. Síðan hava týskvøldsfundir við venjingum og undirvísing verið ígjøgnum alt árið.

Eins og siður hevur verið síðan 2005, vóru umboð fyri samarittarnar við á tónleika-festivalinum Jelling í Danmark. Fýra samarittar vóru á Jelling í 2023, og var tað ein sera læruríkur túrur. Tað er ómetaliga umráðandi fyri samarittarnar at sleppa á tílíkar festivalar at royna seg, at arbeiða saman við øðrum samarittum, og ikki minst tvørfakliga við sjúkrarøktafrøðinum, læknum og presti.

Eisini í ár vóru samarittarnir við til tiltakið Hjartastart á Torginum í SMS, sum hevði til endamáls at varpa ljós á týdningin av fyrstuhjálp og at duga at nýta hjartastartara.

Av vaktum í 2023 kann eitt nú nevnast Ólavsøkan, G! Festivalurin, Voxbotn, Summar-festivalurin, Bátafestivalurin á Toftum, Bátastevnan í Vestmanna.

Í ár fingu samarittarnir hjálp frá samarittum úr Danmark, serliga til Ólavsøkuna. Hettar var ein stór hjálp, og styrkti um sambandið ímillum danskar og føroyskar samarittar.

Samarittarnir eru umbidnir til so nógvar vaktir, at tað er torført at manna allar vaktirnar. Tí verður arbeitt miðvíst við at skapa góðar karmar fyri samarittarnar, og at økja um trivnaðin.

Betri er høvuðsstuðul hjá samarittunum. Stuðulin frá Betri ger sera stóran mun, og er eitt nú við til at styrkja karmar og umstøður hjá samarittunum, og skal harumframt síggjast sum eitt stórt herðaklapp til tað risa arbeiðið, sum samarittarnir gera fyri at økja um tryggleikan kring alt landið.




*Samarittar til Tórshavn marathon, juni 2023.*

## Flóttahjálpin

Flóttahjálpin er eitt netverk av sjálvbodnum og øðrum áhugaðum, hvørs endamál er at veita stuðul, hjálp og vegleiðing til flóttafólk í Føroyum.

Flóttahjálpin tók veruliga dik á seg, tá kríggj brast á í Ukraina og Føroyar skuldu taka ímóti flóttafólki.

Áðrenn lógin um flóttafólk úr Ukraina kom í gildi í apríl 2022, var eingin skipan, ið kundi lofta flóttafólki, sum tá eingi serlig rættindi høvdu í Føroyum. Í hesum tíðarskeiði hjálpti RKF við at útvega innivist, mat, klæðir, innbúgv og annað, sum flóttafólkini høvdu fyri neyðini.

Nú, tá serlógin um flóttafólk úr Ukraina tryggjar flóttafólkum somu rættindi sum føroyingum, so eru tað serliga niðan fyri standandi tænastur, sum Flóttahjálpin bjóðar:

**Móttøkutoymið** eru sjálvboðin, ið taka ímóti flóttafólki, tá tey koma til landið, typiskt vesturi á flogvøllinum. 12 sjálvboðin eru virkin í Móttøkutoyminum, sum eru skipað við einum virksemisleiðara. Tá ein túrur verður gjørdur, eru tað altíð tvey í toyminum, soleiðis at ein kann taka sær av fólkunum og ein kann koyra. Sjálvboðin eru sjónlig í vesti við búmerki á, soleiðis at flóttafólkini vita, at tey eru komin í góðar hendur. Í 2023 gjørdi Móttøkutoymið **42 túrar** at taka ímóti flóttafólki, har tilsamans 65 fólk vórðu heintað, umframt, at tey hjálptu 7 fólkum av landinum aftur.

**Bústaðartoymið** hjálpir við at sýna bústaðir, og kann eisini hjálpa við at flyta og koyra innbúgv, tá flóttafólk skulu flyta.

28 útleigarar skrásettu í 2023 sín leigubústað á heimasíðuni hjá Reyða Krossi. Reyði Krossur samstarvar við Útlendingastovuna um at fáa bústaðir til vega, og sendir innkomnu bústaðirnar til Útlendingastovuna, ið síðani tekur kontakt til útleigaran. Í 2023 framdi sjálvbodni sýnarin hjá Reyða Krossi **24 bústaðarsýningar**, harav 16 vóru í Tórshavn og 8 á bygd. Sýnarin, ið er byggikønur, metur um hvørt bústaðurin er egnaður.

Sjálvboðin í **flytitoyminum** hjálptu við **15 flytingum** og praktiskari hjálp í 2023. Flytitoymið hjálpir at heinta innbúgv og at flyta fólk og viðføri teirra. Oftast hjálpa starvsfólkini í móttøkuhúsinum flóttafólkum at flyta, tá tey skulu úr móttøkuhúsinum í fyrsta bústaðin. Um flóttafólkini hava nógv viðføri, innbúgv skal heintast ella tey skulu flyta út á bygd, verður flytitoymið kallað. Flytitoymið hevur í summum førum eisini hjálpt við praktiskum viðurskiftum í bústøðunum, t.d. hjálpt at seta møblar saman og barnaportur upp.

**Sjálvboðin í Móttøkuhúsinum** hjálpa við ymsum praktiskum og læruríkum virksemi. Í fyrru helvt av 2023, ísv. at starvsnæmingur var á skrivstovuni hjá Reyða Krossi í eitt hálvt ár, var farið undir eina roynd at gera skipaða sjálvbodna undirvísing í Móttøkuhúsinum í eitt nú føroyskum, binding og svimjing. Tilmeldingin var ójøvn, arbeiðsbyrðan rímiliga stór, og av tí, at flóttafólkini búgva so stutt í húsinum, varð gjørt av, at tað ikki var møguligt at halda fram við skipaðari undirvísing eftir at tíðin hjá starvsnæminginum var liðug. Í staðin skipa starvsfólk í Móttøkuhúsinum fyri ymsari undirvísing, tá høvi er til tað, umframt at hjálpa flóttafólkum at tekna seg til eitt nú málundirvísing á kvøldskúlanum.

Í 2023 vóru tíggjar útferðir við búfólkum á móttøkuhúsinum í samstarvi við Klaksvíkar kommunu. Í alt vóru 21 búfólk á útferð í Klaksvík og Norðoyggjum.

**Gávukort** á 1.000 kr. til endurnýtslu-handlarnar hjá Reyða Krossi verða latin til hvørt flóttafólk, soleiðis at tey, ið møguliga eru flýggjað uttan at hava nógv við sær, kunnu keypa sær góð klæðir, skógvar og annað til alla familjuna. Eisini kann Reyði Krossur hjálpa flóttafólkum (áðrenn tey eru komin til landið) at biðja um ókeypis flogferðaseðlar frá Atlantic Airways, sum letur 15 ókeypis flogferðaseðlar til flóttafólk um mánaðin. Og so syrgir RKF, í samstarvi við Føroya Tele og Strandfaraskip Landsins, fyri, at øll flóttafólk, ið koma til landið, fáa tilboð um ókeypis telefonhald og SSL-kort í eitt avmarkað tíðarskeið.

**Samstarv við myndugleikar og stovnar**. Reyði Krossur luttekur á Task Force fundum við myndugleikum og stovnum, ið á ymsan hátt vara av flóttafólkum. Til fundirnar ber Reyði Krossur fram vitan um støðuna hjá flóttafólkum, ið Reyði Krossur hevur samband við, og hevur m.a. víst á tørvin á sálarligari hjálp til flóttafólk. Berin hevur í 2024 fingið játtan til at veita flóttafólkum viðtalur og bólkasamrøður við sálarfrøðing. Reyði Krossur fegnast um at hetta tilboðið er komið í lag til flóttafólk.

Í samband við at tað í 2023 komu fleiri flóttafólkaungdómar til Føroya uttan foreldur, heitti Barnaverndarstova Føroya á Reyða Kross um at samstarva um at finna fyribils foreldramyndugleikahavar. Reyði Krossur hevur í sínum netverki funnið fram til møguligar fyribils foreldramyndugleikahavar og arbeitt verður nú við, at fáa mannagongdina fyri øki endaliga.

**Open Office.** Reyði Krossur hevur fyri flestu flóttafólk verið fyrsta sambandið til Føroyar, og tí eisini eitt stað, ið fleiri venda sær aftur til, hava tey spurningar ella ivamál. Á várið 2023 vóru dømir um ukrainar, ið komu til Føroya at søkja uppihaldsloyvi eftir serlógini, sum ikki fingu uppihaldsloyvi. Summi gjørdu av at finna arbeiði og at søkja uppihaldsloyvi umvegis Fast Track skipanina, meðan onnur gjørdu av at fara av landinum aftur. Reyði Krossur hevur hjálpt nøkrum við vegleiðing um at søkja arbeiði í Føroyum og víst víðari til viðkomandi arbeiðsávísingar. Orsakað av vaksandi tørvinum á vegleiðing, skipaði Reyði Krossur í august 2023 tilboðið *Open Office*, har flóttafólk, eisini tey, ið ikki høvdu fingið uppihaldsloyvið eftir serlógini, kundu koma mánadagar millum kl. 12-15 at leita sær ráð ella bert hava onkran at tosa við. Fýra starvsfólk í Reyða Krossi, ið øll hava skeið í sálarligari fyrstuhjálp, skuldu deilast um hesa uppgávu og kunna veita vegleiðing og eitt lurtandi oyra. Tilboðið hevur tó ikki verið miðlað nóg ofta, og hevur tilboðið ikki verið brúkt. Tó so, avtala flóttafólk prát við starvsfólk ella detta inn á gólvið, tá teimum tørva tað.

## Flóttamóttøkuhúsið

Serlógin um flóttafólk úr Ukraina kom í gildi hin 10. apríl 2022, og sum partur av hesi lógini læt RKF sama dag, í samstarvi við Útlendingastovuna, Móttøkuhúsið upp.

Í Móttøkuhúsinum kunnu flóttafólk búgva ta fyrstu tíðina, tey eru í Føroyum, meðan tey bíða eftir at fáa uppihaldsloyvi. Flóttafólk búgva í miðal á Móttøkuhúsinum í 2-3 vikur.

Í 2023 hava átta starvsfólk starvast í Flóttamóttøkuhúsinum, og við ársenda vóru tey seks í starvi. Eitt starvsfólk er sett sum samskipari, og hevur millum annað ábyrgd av at leggja skema, keypa inn og at hava yvirskipaða yvirlitið yvir húsið og flóttafólkini, meðan restin eru sett at arbeiða í húsinum og hjálpa flóttafólkunum við øllum tí dagliga. Samskiparin hevur sum oftast eisini samskifti við flóttafólkini áðrenn tey koma til landið og boðar eisini Útlendingastovuni frá, hvør kemur og nær.

Móttøkuhúsini eru eini vanlig, stór, sethús í Tórshavn. Pláss eru fyri 14 gistandi í senn, í seks kømrum, og um tørvurin vísir seg at vera størri enn tað, er møguleiki at opna eitt eyka Móttøkuhús, ið liggur nærhendis hinum, og hevur fýra kømur. Hetta hevur verið neyðugt nakrar ferðir í 2023.

Tilsamans 84 flóttafólk hava búð á Flótta-móttøkuhúsunum í 2023. Av teimum vóru 19 børn.

Í móttøkuhúsinum fáa flóttafólk vegleiðing og stuðul, millum annað fáa tey tilboð um heilsukanning, tey fáa pening til uppihald/mat, ein reinførispakka (við sápu, tannkremi o.s.v), ein dýnupakka (við dýnu, handklæði o.s.v), eitt gávukort til endurnýtsluhandlarnar hjá Reyða Krossi, tey fáa hjálp til at søkja um uppihaldsloyvi, bankakontu, p-tal, Samleikan, umframt ráðgeving og annað, sum tey hava tørv á.

Hin 21. desember skipaðu búfólk saman við starvsfólkum fyri jólahaldi fyri búfólkum, gestum teirra og starvsfólkum í Flótta-móttøkuhúsinum. Maturin var siðbundin ukrainskur jólamatur. Tað varð borðreitt við 12 ymiskum rættum. Allur maturin var gjørdur frá botninum. Sungið var á ukrainskum/russiskum og á føroyskum, og prátið gekk væl. Eitt hugnaligt og rørandi kvøld.

Við árslok 2023 var markið á 200, sum politiska skipanin hevur sett fyri talið á flóttafólki, sum Føroyar skulu taka ímóti, næstan nátt. Politiska skipanin viðger í 2024 uppskot um at broyta hámarkið til 250.



*Frá jólaborðhaldinum í Flóttamóttøkuhúsinum*



*Mynd: Gwenaël Akira Helmsdal Carré*

# SOSIALT ARBEIÐI

**RKF hevur eina røð av hjálpartænastum innan sosiala økið í Føroyum, herundir vitjanartænastu, mat- og klædnahjálp, familjulegu fyri tilflytarar, Reyða Kross Vinir, Málkafé og samstarv við millum annað Barnabata og Kvinnuhúsið.**

***146** vinapør í Vitjanartænastuni og Reyða Kross Vinum*

***1320** fólk fingið mat- og klædna-hjálp*

***51** Málkaféir í Tórshavn og Klaksvík*

## Vitjanartænastan

Vitjanartænastan hjá Reyða Krossi virkar fyri at basa einsemi og fyri at skapa trivnað. Stórur áhugi er fyri Vitjanartænastuni, sum í 2023 var virkin í Tórshavn, í Norðoyggjum, í Suðuroy, í Sandoy, í Vágunum, í Vestmanna, í Nes kommunu, á Eiði, í Fuglafirði, í Eysturkommunu og í Runavíkar kommunu.

Í 2023 vóru næstan 90 vitjanarvinir kring landið, sum tilsamans brúktu umleið **6.500 tímar** uppá at vitja – tað er tað sama sum 541 tímar um mánaðin ella 125 tímar um vikuna, sum sjálvboðin í Vitjanartænastuni brúka uppá at vitja borgarar og basa einsemi.

Í **Tórshavn** eru 40 sjálvboðin í Vitjanartænastuni, sum í 2023 brúktu tilsamans 1.052 tímar at vitja. Vitjað verður á Boðanesheiminum, á Lágargarði, á Tjarnagarði, í eldrasambýlunum, og eisini heima við hús. Vitjanartænastan í Tórshavn hevur verið við til nógv tiltøk í 2023, millum annað sum partur av verkætlanini *ABC fyri sálarliga heilsu* hjá Fólkaheilsuráðnum.

Í **Norðoyggjum** eru 12 virknir vitjanarvinir, sum í 2023 vitjaðu ein vin í part. Tað gongur sum heild væl, burtursæð frá, at tað ikki eru nóg nógvir vitjanarvinir til at nøkta tørvin. Trivnaðurin ímillum sjálvboðin er góður, og skipað verður árliga fyri hugnaløtum og onkrum skeiði.

Tað eru fimm vitjanarvinir á **Sandoynni**, sum vitja átta fólk, ið búgva heima ella á einum av trimum ellisheimunum í sýsluni. Tað er tørvur á fleiri vitjanarvinum á Sandoynni, hóast teir vitjanarvinirnir, sum eru, eru sera sjálvkoyrandi og røsk at vitja.

Í **Nes kommunu** eru sjey sjálvboðin, sum tilsamans vitja 10 fólk. Tað hevur gingið væl í 2023, og koyrir sína regluliga gongd. Í **Vágunum** koyrir alt sína vanligu gongd – tey eru fimm sjálvboðin, sum vitja á Ellisheiminum á Sýnini og heima við hús. Ein er byrjað í 2023. Í **Vestmanna** koyrir vitjanartænastan væl – tað eru 7 virknir vitjanarvinir, sum regluliga vitja sín vin. Fýra onnur hava verið virkin, men eru ikki longur, tí móttakararnir andaðust. Í **Suðuroy** eru tey fýra sjálvboðin. Á **Eiði** hava

trý roynt seg sum sjálvboðin í 2023, og við ársenda vóru tvey føst sjálvboðin, sum vitja hvør sín vin.

Hin 12. apríl 2023 var samstarvsavtala um vitjanartænastu í **Runavíkar kommunu** undirskrivað. Sjálvbodnu samskipararnir brúktu nógva tíð uppá at kunna um nýggju tænastuna á økisfundum hjá Roðanum í nærum øllum 15 bygdunum í kommununi, umframt á sosialum miðlum. Tvey pør vórðu sett saman í 2023. Ætlanin fyri framtíðina er at vera meira uppsøkjandi og kanna møguleikarnar fyri, at fáa fleiri vinir inn á ellis- og røktarheim at vitja, t.d. í felagsstovum við upplestri, sangi ella stokkum og práti. Møguliga hetta kann gera tilboðið meira sjónligt, alment og vanligt fyri fólk flest.

Orðini niðanfyri eru frá einum vitjanarvini:

> “...eg vil eisini takka fyri høvið, at eg slapp at kenna hendan persón so væl og inniliga. Hettar sum Reyða Kross Vitjanartænastan ger, er eitt ótrúligt arbeiði fyri eldri fólk og ikki minst eisini fyri okkum, sum hava eina løtu til teirra.”

Í juli 2023 skrivaðu LÍV og RKF undir eina trý ára avtalu, sum inniber, at LÍV er høvuðsstuðul hjá Vitjanartænastuni. Tænastan hevur seinastu árini verið merkt av øktum áhuga, og tí er tað sera gleðiligt, at hendan avtalan kann vera við til at tryggja karmarnar og grundarlagið undir tænastuni.



*Stuðulsavtala við LÍV um Vitjanartænastuna undirskrivað*

# Mat- og Klædnahjálpin

Mat- og Klædnahjálpin letur mat og klæðir til familjur og einstaklingar, sum av ymiskum orsøkum ikki fáa endarnar at røkka saman. Sjálvboðin í Mat- og Klædnahjálpini eru bundin av tagnarskyldu, og dentur verður lagdur á, at tænastan er so dulnevnd sum gjørligt.

2023 var merkt av metnógvum fyrispurningum. Talið av umbønum í 2023 var 442, og tilsamans fingu **1320** fólk hjálp frá Mat- og Klædnahjálpini í 2023, harav vóru 697 børn. Samanborið, var talið á umbønum í 2022 302, og í 2021 vóru 153 umbønir.

59% av øllum umbønum í 2023 snúðu seg *einans* um mat, og tilsamans snúðu 88% av umbønunum seg um mat *og* klæðir. Hetta rákið, har alsamt fleiri borgarar biðja um mathjálp, gerst týðiligari fyri hvørt ár.

Eins og undanfarin ár komu tveir triðingar av umbønunum frá húsarhaldum við einum uppihaldara, og ein út av seks umbønum komu frá pensionistum.

Mat- og Klædnahjálpin er skipað við einum virksemisleiðara, og tilsamans eru sjey sjálvboðin virkin í bólkinum, sum arbeiða væl saman og javnan hittast til fundir. Bólkurin tekur sær av vakttelefonini og av at gera pakkarnar klárar til at deila út. Harumframt eru tveir sjálvbodnir bilførarar, sum eitt nú heinta frystivøruna.









Klæðini koma í høvuðsheitum frá endurnýtsluni hjá Reyða Krossi.

Til mathjálpina verður sjógæti latið frá stuðlunum JFK, Hiddenfjord og frá bátinum Jupiter. Oksakjøt, høsnarungi, og turrvøra, so sum pasta, rís og havragrýn verður keypt í heilsølum. Av og á fær tænastan eisini matgávur frá bóndum, heilsølum og privatpersónum, eitt nú ræst kjøt, turran fisk og jólapakkar frá arbeiðsplássum.

Í desember var eitt samstarv við FK, har fólk kundu keypa og lata vøru í Jólavognar í FK handlum kring landið. Sjálvboðin í Mat- og klædnahjálpini koyrdu síðan runt og tømdu vognarnar, og pakkaðu vøruna í pakkar til tey, ið bóðu um hjálp. Samstarvið gekk fyrimyndarliga gott, og eigur stóran part í, at heili 104 pakkar við mati vóru lutaðir út í desember.

Metstóri eftirspurningurin eftir tænastuni í 2023 hevur havt við sær, at kostnaðurin av tænastuni er vorðin hægri. Við góðum stuðulsavtalum vóru 303.000 kr. brúktar til at keypa mat og klæðir til tænastuna í 2023 – í mun til 293.000 kr. í 2022.



*Nakað av vøruni, sum kom frá jólavognunum í FK. "Hetta er við til at bjarga jólunum" søgdu fleiri, ið komu eftir pakkum.*

Øll, sum hava tørv á mat- ella klædnahjálp, eru vælkomin at seta seg í samband við Mat- og Klædnahjálpina á tel. 283670, klaednahjalp@redcross.fo, ella á www.redcross.fo/matogklaednahjalp

## Integratión

Seinnu árini eru alsamt fleiri tilflytarar komnir til Føroya. Eitt av endamálunum hjá Reyða Krossi Føroya er *at virka fyri at fremja vinalag og altjóða fatan millum fólk tvørturum landamørk*. Tí hevur RKF síðani 2016 arbeitt við integratiónsátøkum. Í 2023 vóru trý átøk fyri at betra um trivnað og integratión hjá nýggju borgarunum: Familjulegan, Málkafé og Reyða Kross Vinir.

## Familjulega fyri fólk við tilflytarabakgrund

RKF hevur síðani 2018 skipað fyri familjulegu, ætlað fólki við tilflytarabakgrund. Legan verður vanliga hildin á heysti í leguhúsunum í Nesvík, og hevur verið sera væl eydnað. Endamálið við leguni er at betra um integratiónina og trivnaðin hjá tilflytarum í Føroyum.

Familjulegan í 2023 var um mánðarskiftið september-oktober. Tilsamans vóru 120 fólk savnaði á altjóða familjuleguni, 25 familjur (85 persónar) við altjóða bakgrund, og 35 sjálvboðin og samarittar. Tjóðskapirnir vóru 23 í tali.

Tað var ein spennandi, stuttlig og avslappandi lega, har luttakandi og sjálvboðin hoyrdu um tjóðskapin hjá hvørjum øðrum, spældu ymisk spøl inni og úti, gjørdu yoga, dansaðu, teknaðu og málaðu, vóru til náttúruterapi, sungu, ótu góðan brasilskan mat, grillaðu skúmgæti í vakra mánalýsinum - og annars høvdu tað gott saman. Afturmeldingarnar frá luttakarunum vóru sera jaligar.

Legan er eitt gott høvi fyri útlendingar úr øllum Føroyum at hitta onnur í somu støðu, at hugna sær saman og at práta um felags avbjóðingar, upplivingar og royndir í einum tryggum umhvørvi.

## Málkafé

Málkafé var fyri fyrstu ferð í september 2022. Málkafé er ein óformlig støkk-inn kafé, har sjálvboðin úr Reyða Krossi práta føroyskt við tey, sum ynskja at venja føroyska málið. Dentur verður lagdur á, at tað er eitt trygt stað fyri tilflytarar at koma og kenna seg væl. Tað sosiala er í hásæti við spølum og øðrum kreativum virksemi fyri at venja málið, soleiðis at tað ikki einans er standardiserað

málundirvísing. Eingin tilmelding krevst, og allir tilflytarar eru vælkomnir. Ein vitjandi segði í 2023:

> "The málcafé has helped me with learning Faroese. It is quite rare to actually have that type of situation during daily life, where people take the time to try to understand what you are saying, and especially making sure you are understanding what they are saying. Also, socially it has been great, to get to meet people in the same situations as you."

Málkafé er skipað við einum virksemisleiðara og vikuleiðarum fyri hvørja viku sær. Í alt eru 30 sjálvboðin virkin á málkafé – 22 í havn og 8 í Klaksvík, sum nýta umleið tveir tímar hvør um mánaðin. 51 málkaféir vórðu hildnar í 2023.

Málkaféir eru føst tíðspunkt á bókasavninum í Tórshavn og í Klaksvík. Í Tórshavn hvønn hósdag kl. 17–19 á triðju hædd á Býarbókasavninum, og í Klaksvík annanhvønn hósdag kl. 17–19 á Klaksvíkar bókasavni.

2023 var sum heild eitt væleydnað ár í Málkaféini. Vitjandi úr londum kring allan heimin møta hvørja viku til Málkafé, og nýggj vitjandi leggjast javnan afturat. Vitjandi siga seg kenna tað sum eitt stað, har tey kunnu venja málið, samstundis sum tað er eitt sosialt netverk og ein felagsskapur við bæði lokalum og altjóða limum.

Tá Fjølmentanarvikan var í oktober, skipaðu Málkaféirnar fyri serligum tiltøkum. Á Málkafé í Klaksvík varð føroyskt vant við at spæla borðspøl og kvøða. Á Málkafé í Tórshavn gjørdu tey tað øvugt - vitjandi, ið vanliga koma at venja føroyskt, kundu hesuferð læra frá sær sítt móðurmál.



*Málkafé á Fjølmentanarvikuni 2023*

## Reyða Kross Vinir

Reyða Kross Vinir eru sjálvboðin, ið bjóða seg fram at vera vinur ella vinafamilja hjá tilflytarum og flóttafólkum. Endamálið við Reyða Kross Vinum er at arbeiða fyri, at tilflytarar, ið lítið tilknýti hava til Føroyar, fáa so góða byrjan í nýggja landinum sum gjørligt. Sjálvboðin kunnu gera stóran mun, tí tey tosa málið, kenna umhvørvið, føroysku mentanina og føroyska samfelagið, og bara tað ger, at sjálvboðin kunnu hjálpa við einari rúgvu av gerandisavbjóðingum.

Tørvurin á Reyða Kross Vinum var stórur í 2023, serliga millum flóttafólk úr Ukraina. Tilsamans 30 vinapør vóru sett saman í árinum. Hetta merkir, at gott 50 tilflytarar (vaksin og børn) vóru matchaði við sjálvbodnum vini ella vinafamilju. Tilsamans hava verið 56 match síðani Reyða Kross Vinir byrjaði seinast í 2021. Luttakararnir hava verið úr sjey ymsum londum. Í løtuni eru nærum 90% av teimum, sum hava Reyða Kross Vin, flóttafólk úr Ukraina.

Í 2023 vóru trý kunningarkvøld fyri fólki, ið vóru áhugaði at gerast sjálvboðin. Til kunningarkvøldini, fingu áhoyrararnir at vita um arbeiði hjá Reyða Krossi, um støðuna hjá tilflytarum og flóttafólkum, um Reyða Kross Vinir og leiklutin sum sjálvboðin.

Av tiltøkum fyri Reyða Kross Vinum var túrur til Listasavnið í mars, hugnadagur í september og jólahald í desember. Jólahaldið varð fyriskipað í samstarvi við flóttafólka-samskiparan hjá Tórshavnar kommunu, og luttóku gott 70 sjálvboðin, tilflytarar og flóttafólk úr Reyða Kross Vinum úr øllum landinum, umframt onnur flóttafólk í Tórshavnar kommunu.

Fleiri sjálvboðin í Reyða Kross Vinum tóku sálarligt fyrstuhjálparskeið, ið varð bjóðað í november.

Í 2023 hevur verið arbeitt við at fáa sjálvbodnar virksemisleiðarar til Reyða Kross Vinir. Arbeiðið at hitta nýggj sjálvboðin, nýggjar luttakarar og at avgera, hvør skal verða vinur hjá hvørjum, hevur higartil verið gjørt av sjálvbodnu leiðarunum og sosialsamskiparanum á skrivstovuni. Stóri tørvurin á Reyða Kross Vinum og ólidnar arbeiðsgongdir hava gjørt tað avbjóðandi at fáa sjálvbodnar leiðarar at trívast, og summir eru givnir. Orsakað av stóra tørvinum, hava ymsar royndir verið gjørdar, sum hava riggað meir ella minni gott, og tíverri er komið fyri, at

bíðitíðin hjá tilflytarum at fáa ein vin hevur verið ov long. Hesum verður arbeitt við í 2024. Tó skal viðmerkjast, at teir sjálvbodnu leiðararnir, sum vóru í 2023, hava gjørt eitt flott arbeiði at matcha og fylgja upp við vinapørum, og hava eina stóra tøkk uppiborna fyri teirra tíð og ágrýtni.

## Jólahjálp

Tíverri eru nógvar barnafamiljur her í Føroyum, ið hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman, og ofta er hetta serliga torført um jólini. Tí gleðist RKF um samstarvið við Barnabata um Jólahjálp fimta ári á rað. Jólahjálpin er skipað til frama fyri barnafamiljur, sum hava trong fíggjarlig kor, og tað er Barnabati, sum tekur ímóti og viðger umsóknirnar.

Til hetta endamál læt Reyði Krossur í 2023 **400 gávukort á 1.000 kr**. Til samanberingar vóru í 2022 latin 375 gávukort. Gávukortini vórðu latin við góðum avsláttri frá Føroya Keypsamtøku, sum altíð er ein trúfastur stuðul hjá Reyða Krossi.

## Jólabókagávur

RKF hevur í fleiri ár latið bókagávur til stovnar í Føroyum, sum á ymiskan hátt hjálpa børnum í desember mánaði, og aftur í 2023 var hetta góða átakið framt. Tað eru sjálvboðin í bókaendurnýtsluni hjá Reyða Krossi, sum hava savnað og pakkað bøkurnar.

Bøkurnar vóru latnar Barnaheiminum og Barna- og Ungdómspsykiatriini. Bókagávurnar vóru væl móttiknar á øllum støðunum, og bæði starvsfólk og børn vóru glað fyri vitjanina og fyri bøkurnar, sum koma væl við í gerandisdegnum.

# INNSAVNINGAR

**Reyði Krossur Føroya skipar fyri innsavningum fyri at hjálpa, har neyðin er størst, bæði í Føroyum og kring heimin.**

## Filateli

Filateli er søla av frímerkjum. Alt tilfar, sum kemur inn, verður klipt og sent til Danmarkar til sølu.

Inntøkan fyri 2023 var 3.550 kr.

## Peningakistlar

Reyði Krossur Føroya hevur tveir peningakistlar standandi, og inntøkan úr teimum í 2023 var 18.875 kr.

Ein peningakistil stendur hjá Visit Tórshavn í Steinatúni. Í 2023 vóru 5.498 kr. latnar í hann.

Ein kistil stendur á Flogvøllinum, har var upphæddin 13.377 kr. í 2023.

## Landsinnsavning

Leygardagin 2. september 2023 var árliga Landsinnsavningin, har sjálvboðin gingu hús í hús við bússum og savnaðu pening inn til hjálparabeiðið hjá Reyða Krossi.

Hetta var fyrstu ferð síðan korona at skipað varð fyri siðbundnari hurð-til-hurð innsavning, og var tað tí spennandi at fylgja við í, hvussu innsavningingin fór at eydnast.



Tað vísti seg, at meðan innsavningin uttanfyri Havnina, sum altíð er frammanundan skipað við føstum innsavnarum, gekk uppá stás, so gekk minni gott í Tórshavn, har innsavningin er skipað soleiðis, at litið verður á, at fólk møta upp hjá Reyða Krossi og heinta sær eina bússu. Tíverri var veðrið ikki til vildar hendan dagin, og tað hevði við sær, at mong í Tórshavn aftraðu seg at fara út og savna inn, orsakað av nógvum regni og vindi. Hetta var sjálvandi harmiligt, tí vit høvdu frætt, at nógv væntaðu sær vitjan av Reyða Krossi. Tí varð gjørt av at gera enn ein innsavningardag í Tórshavn, eina viku seinni. Hesuferð møttu fleiri upp, og tilsamans gingu fleiri hundrað sjálvboðin hús í hús kring alt landið til landsinnsavningina.

Hjartans tøkk til øll sjálvboðin, ið hava gingið við bússu og takk til øll, sum hava stuðlað.

Tá samanum kom fekk Reyði Krossur 1,7 milliónir krónur inn til Landsinnsavningina. Hetta er eitt sera gott úrslit og eitt týðandi grundarlag fyri, at Reyði Krossur kann hjálpa, bæði í Føroyum og kring heimin.

## Opið hús

Hin 25. november 2023 var Opið Hús hjá Reyða Krossi í Stiðjagøtu 6. Tá høvdu øll áhugað møguleika at koma framvið og síggja sjálvbodna virksemið í RKF, millum annað, hvussu klæðir verða innsavnað, skild og seld. Eisini kundu tey vitjandi hitta sjálvboðin úr fleiri ymiskum virksemisøkjum, síggja framløgur eitt nú um Krígsins Reglur og Altjóða Humanitera Lóg, royna VR brillur, gera jólaklipp við sjálvbodnum úr sosiala økinum, og børnini høvdu møguleika at taka barnafyrstuhjálparskeið. Samstundis var endurnýtsluhandilin opin leingi við hópin av góðum tilboðum og kaffi- og køkusøla. Eisini var tónleikur við Jens Marna Hansen, Sergey Illin og Ingmari Mikkelen.

Endamálið við tiltakinum var at kunna um og vekja áhuga fyri arbeiðinum hjá RKF, at fáa fleiri sjálvboðin og at savna pening inn til hjálpararbeiðið. Tiltakið var sera væleydnað. Nógv fólk løgdu leiðina framvið og fingu vitan um RKF, keyptu eitt plagg ella ein kaffimunn, samstundis sum fleiri nýttu høvið at lata stuðul og at gerast limir.




*Mong nýttu høvi at royna virtual reality brillurnar, har tú kanst fáa kensluna av at ferðast runt í einum krígsraktum øki í Ukraina og hitta íbúgvar á staðnum.*



# ALTJÓÐA ARBEIÐI

**Reyði Krossur Føroya lat 4.950.000 kr. til 11 ymsar altjóða humaniterar verkætlanir í 2023. Verkætlanirnar høvdu í høvuðsheitum til endamáls at fremja likamliga og sálarliga heilsu, at betra um útbúgving, at menna ávaringarskipanir, at arbeiða fyri betri lívsgrundarlagi hjá menniskjum í kreppuraktum økjum, umframt aðra neyðhjálp.**

***11** altjóða verkætlanir fingið stuðul*

***4,9 mió. kr.** til altjóða verkætlanir*

## Karmar

RKF samstarvar við Føroya Landsstýrið um at veita altjóða humanitera hjálp. Samstarvs-avtalan inniber millum annað, at Landsstýrið letur ein part av játtanini til humanitera hjálp til RKF. Í 2023 læt Landsstýrið 2.000.000 kr. til altjóða humaniterar verkætlanir hjá Reyða Krossi.

Harumframt hevur RKF samstarvsavtalu við Reyða Kross í Danmark (RKiD) um veiting av altjóða humaniterari hjálp. Samstarvsavtalan við RKiD inniber eitt nú, at stuðulin, ið RKF veitir til altjóða átøk, verður sendur út í heim umvegis RKiD, og at RKF ikki rindar umsitingargjald av teimum upphæddum.

## Altjóða starvsfólk hjá RKF

Í november 2021 var Sanna Nolsøe Djurhuus send til Malavi sum umboð fyri RKF. Í Malavi hevur Sanna í høvuðsheitum arbeitt við ávaringarskipanini Forecastbased Action (FbA), sum nýtir nýmótans tøkni, veðurfrøði og váðalýsingar til at økja um vitanina um veðurlagskreppur í framtíðini. Endamálið við skipanini er at minka um avleiðingarnar av eitt nú vatnflóð í Malavi. Sanna hevur millum annað arbeitt við at menna FbA skipanina og at savna inn viðkomandi kunning og dátur, soleiðis at tað er møguligt at seta tiltøk í verk, áðrenn vanlukkan rakar.



*Sanna Nolsøe Djurhuus (t.h.), saman við sjálvbodnum til eina venjing, har tað bleiv simulerað, at áin fløddi. Nakrar mánaðir seinni, hendi tað í veruleikanum, tá tropiska ódnin Freddy rakti.*

Í 2022 varð starvssáttmálin hjá Sannu longdur við enn einum ári, og hevur Sanna starvast í Malavi, sum Forecast-based Officer, inntil árslok 2023.

## Hjálp til Malavi eftir tropisku ódnina Freddy

Tropiska ódnin Freddy, sum í mars 2023 herjaði sunnara partin av Afrika, elvdi til svára humanitera kreppu í Malavi. Undantaksstøða varð lýst í suður Malavi og mett varð, at meir enn ein hálv millión menniskju vórðu rikin frá húsum.

Malavi stríddist frammanundan við eini umfatandi kolerafarsótt, og ódnin gjørdi einans ilt verri.

Í einum landi, har einans 11% av íbúgvum hava streym, er tað ómetaliga ringt at røkka teimum, sum búgva í útsettum økjum kring landið. Tí kom ávaringaskipanin, sum millum annað føroyska Sanna Nolsøe Djurhuus hevur arbeitt við at menna, sera væl við, og komu boð til øll tey sjálvbodnu tilbúgvingarliðini um meldurhvirluna ígjøgnum eina app á snildfonini í góðari tíð. Tilbúgvingarliðini ávaraðu síðan hvør sítt nærumhvørvi við hjálp av tilbúgvingarætlanunum, sum tey sjálvi høvdu verið við til at menna. Ígjøgnum snildfonina kundu tey eisini senda boð til Reyða Kross, við m.a. dagføringum um, hvat var gjørt, og um tørvur var á meiri útgerð ella aðrari hjálp.

Reyði Krossur Føroya lat 300.000 kr. til at hjálpa neyðstøddum eftir oyðileggjandi ódnina í 2023.

## Hjálp eftir jarðskjálvta í Turkalandi og Sýria

Mánamorgunin 6. februar 2023 vóru tveir ógvusligir jarðskjálvtar í Turkalandi og Sýria. Tvær vikur seinni gjørdi enn ein ógvusligur jarðskjálvti syndarligu støðuna í londunum uppaftur verri. Fleiri enn 50.000 menniskju lótu lív og enn fleiri vórðu særd.

Reyði Krossur í Turkalandi og Sýria arbeiddu ótroyttiliga, síðan fyrsta dagin, við at hjálpa neyðstøddum børnum og vaksnum. Av tí, at lokalu Reyða Kross toymini vóru staðkend, høvdu tey serliga atgongd til tey harðast raktu økini, og arbeiddu tey áhaldandi við at veita kropsliga og sálarliga fyrstuhjálp, býta út neyðsynjarvørur, so sum mat og drekka, teppir og skjól. Sum tíðin gekk, skifti fokus so líðandi frá bjargingararbeiði til at veita neyðugan stuðul til tey, sum høvdu mist heim, ognir, arbeiði og síni kæru.

Reyði Krossur Føroya læt 1.35 mió. kr. til neyðhjálpararbeiðið í londunum báðum. Ein millión av hesi upphædd varð latin frá Føroya landsstýri.

## Hjálp eftir yvirflóð í Libya

500.000 kr. vórðu sendar til hjálpararbeiðið í Libya eftir at ódnin Daniel, ið rakti hin 10. september 2023, elvdi til eina oyðileggjandi vatnflóð. Fleiri túsund fólk lótu lív og nógvur kritiskur infrastrukturur varð lagdur í oyði. Eitt nú hevði ógvusliga avfallið við sær, at ein vatnbyrging sprongdist og skolaði stórar partar av býnum Derna á sjógv. Tey, ið komu undan við lívinum, høvdu átrokandi tørv á neyðhjálp so sum drekkivatni, mati, skjóli og sálarligum stuðli. Reyði Krossur var frá fyrsta degi á staðnum og røkti bjargingararbeiði og veitti fyrstuhjálp umframt aðrar bráðfeingis hjálpartænastur.

## Hjálp eftir jarðskjálvta í Marokko

250.000 kr. vórðu sendar til hjálpararbeiðið eftir ógvusliga jarðskjálvtan í Marokko, hin 8. september 2023. Fleiri av harðast raktu økjunum vóru smáar bygdir høgt uppi í Atlasfjøllunum, har nógv mistu alt. 380.000 fólk gjørdust fyribils ella varandi heimleys, í minsta lagi 530 skúlar fingu skaða, og í minsta lagi 3.000 fólk lótu lív. Reyði Krossur á staðnum fór í gongd við bjargingararbeiði beinanvegin, og við hjálp frá øðrum Reyða Kross feløgum var áhaldandi arbeitt við at veita neyðhjálp so sum mat og innivist.

## Hjálp eftir jarðskjálvta í Afghanistan

Í oktober 2023 var ein ógvusligur jarðskjálvti í Afghanistan, og hareftir vóru fleiri eftirskjálvtar, sum raktu tað frammanundan illa-stadda landið. Útvið 2.500 fólk lótu lív í jarðskjálvtunum og nógv fleiri vóru á annan

hátt ávirkað av støðuni. Lokalu Reyða Hálvmánaðfeløgini stríddust fyri at bjarga fólki úr húsaleivdum og at veita neyðhjálp so sum vatn, mat, teppir og sálarligan stuðul til tey, ið høvdu mist bæði hús og familju.



*Jarðskjálvtin í Afghanistan, ið málti 6,3 stig, legði heilar bygdir í oyði, og nógv vórðu fangað undir leivdunum.*

## Hjálp til neyðstødd í Ísrael og Gaza

Síðan stríðið ímillum Ísrael og Gaza spentist í oktober 2023, hava nógv ósek mannalív verið kravd, og humaniteru avleiðingarnar hava verið øgiligar.

Reyði Krossur er virkin á staðnum, við Reyðu Dávidstjørnu í Ísrael og Palestinensiska Reyða Hálvmána í Gaza. Lokalu feløgini hava í báðum støðum eitt nú ábyrgd av sjúkraflutningi - at koyra særd og deyð til sjúkrahús og klinikkir, og tíverri hava báðar síður upplivað, at sjúkrabilar eru álopnir av stríðshuganum. Hetta eigur ikki at koma fyri, og er tað brot á tær relgur, sum eru galdandi í kríggi. Altjóða Reyði Krossur hevur tí áhaldandi heitt á báðar síður um at virða altjóða humanitera lóg, sum eitt nú sigur, at sivilir borgarar og heilsustarvsfólk ongantíð eru eitt mál og mugu verjast til ein og hvørja tíð, og at gíslatøka ongantíð eigur at koma fyri. Umframt sjúkraflutning arbeiða feløgini bæði við at veita neyðhjálp so sum vatn, mat og streym.

Reyði Krossur Føroya læt í 2023 400.000 kr. til humanitera hjálp í Ísrael og 400.000 kr. til Reyða Kross í Palestina. Helvtin av stuðlinum varð latin frá Føroya landsstýri.

## Hjálp til tey harðast raktu í Somalia

Nimo Ali er ljósmóðir og ein lyklapersónur í einum av heilsutoymunum í somaliska Reyða Hálvmána, sum koyra runt til ymsu fjarskotnu bygdirnar. Hon greiðir frá:

> "Vanliga ferðast vit við okkara flytiføra toymi. Í dag eru vit í einum av teimum bygdunum, sum eru harðast rakt av turki. Turkurin hevur havt við sær, at nógv ikki hava nóg mikið at eta. Tær flestu kvinnurnar, sum eru við barn, hava blóðmangul, og ein stórur partur av børnunum í bygdini eru undirfødd. Soleiðis er støðan her."

Reyði Krossur Føroya er ein av teimum felagsskapunum, sum stuðla flytiføru heilsutoymunum í Somalia, ið veita grundleggjandi heilsutænastur og heilivág í teimum økjum, har heilsutænastur mangla. Somalia er rakt av tí ringasta turkinum, sum hevur verið í áratíggjur, og tað eru mong, sum hava mist síni kríatúr og sítt lívsgrundarlag. Saman við samstarvspørtum teirra, ger Reyði Hálvmáni í Somalia alt tað, tey eru ment, fyri at stuðla teimum, sum stríðast, orsakað av turkinum.

Saman við Føroya landstýri læt Reyði Krossur 500.000 kr. til humanitera verkætlan í Somalia.

## Hjálp til neyðstødd børn í Myanmar

Samanbrestir ímillum vápnaðar bólkar, yvirflóð og trupul atkomuviðurskifti gera ta longu sváru humaniteru støðuna í Myanmar enn verri. Fleiri enn 2 mió. menniskjur eru rikin frá húsi og heimi. Umleið 40% av teimum eru børn, sum nú noyðast at búgva í yvirfyltum legum, í frumskóginum ella í øðrum improviseraðum skjólum. Heimleysar familjur liva undir sera ótryggum viðurskiftum og stríðast fyri at fáa mest grundleggjandi tørvir á reinum vatni, mati, heilsu- og reinførisviðurskiftum, nøktaðar. Hendan støðuga strongdin og óttin hava ógvusligar fylgjur við sær, bæði fyri kropp og sinn, og serliga er sálarheilsan hjá børnum og ungum í vanda.

Við stuðli frá Føroya Landsstýri, læt RKF 500.000 kr. til at styrkja arbeiðið at betra um sálarheilsuna hjá neyðstøddum í Myanmar. Serliga fóru pengarnir til at styrkja førleikarnar hjá Reyða Krossi í Myanmar at veita sálarliga fyrstuhjálp til børn og ung, umframt at seta á stovn barnavinarlig rúm (child-friendly safe spaces) í neyðstøðum.




*Reyði Krossur í Myanmar fegnast um stuðulin úr Føroyum, sum tey siga hjálpir teimum í arbeiðinum "at tryggja framtíðina fyri børnini í Myanmar".*

## Hjálp til neyðstødd í Jemen

Humanitera kreppan í Jemen er ein av teimum álvarsamastu í nýggjari tíð. Fýra út av fimm borgarum stríðast dagliga við at fáa mat í munnin. ST metur, at umleið 20 mió fólk í Jemen mangla atgongd til grundleggjandi heilsutænastur, og einans helvtin av sjúkrahúsunum í landinum eru virkandi.

Reyði Hálvmáni í Jemen rekur í dag 22 heilsu-deplar í landinum. Tíverri rýma nógvir læknar og sjúkrarøktafrøðingar úr landinum. Men Anisha, sum er lækni, er tó ikki rýmd. Hon greiður soleiðis frá:

> "Framtíðarútlitini eru ræðulig. At verða verandi í landinum er næstan sum ein deyðadómur. Men eg verði kortini verandi. Eg kann ikki fara frá mínum sjúklingum. Hugsa tær, um tey komu og spurdu eftir mær, og eg ikki var her."

Við stuðli frá Føroya Landsstýri hevur Reyði Krossur Føroya latið 500.000 kr. til humanitera hjálp í Jemen. Stuðulin fer til at betra um atgongd til heilsutænastur, við serligum atliti til kvinnur í viðgongutíð og nýføðingar.

## Samstarv við United World College Red Cross Nordic

United World College Red Cross Nordic bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið á sumri er liðugur í 1. flokki í eini gymnasialari miðnámsútbúgving, at taka eitt altjóða studentsprógv, kallað IB (International Baccalaureate) á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. IB er ein altjóða studentspróvtøka, ið tekur 2 ár. Eitt IB prógv gevur somu rættindi innan hægri framhalds-lestur sum eitt føroyskt studentsprógv.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og hetta verður m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 80 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

UWC nevndin hevði ein upptøkufund í februar 2023, har ein næmingur varð úttikin til skúlan í Noregi. Ein næmingur verður upptikin um árið til ta tvey ára gymnasialu útbúgvingina, og hetta merkir, at tað altíð eru tveir føroyskir næmingar á UWC skúlanum, sum Føroya Landstýri letur stuðul til. Næmingarnir lata væl at og eru glaðir fyri at ganga á skúlanum.